## Vatnhamar er ikki við

Tróndur Vatnhamar er ikki við í hópinum hjá B36, sum í løtuni fyrireikar seg til fyrra dystin í Europe League móti FC Olimpi Rustavi. Søgur hava seinastu vikurnar verið, at málverjin fer í annað felag, men framvegis einki er váttað. Í hansara stað er 18 ára gamli Terji Rasmussen úttikin sum eykamálverji hjá Jóan Paula Dahl Jakobsen.



## Benzema tekur sjálvur avgerðina

Manchester United, Arsenal og Real Madrid eru millum feløgini, sum hava sýnt unga Karim Benzema úr Lyon áhuga. Nú sigur franski arbeiðsgevi hansara, at 21 ára gamli framherjin sjálvur tekur avgerðina, um hann heldur fram í felagnum ella ikki. – Tað verður sjálvsagt saknur í Benzema, um hann skiftir felag. Men vit vilja ikki seta fót fyri honum, um hann ætlar sær víðari, sigur Claude Puel, venjari hjá Lyon, við heimasíðuna hjá Lyon.



Áki Andreasen kendi seg sum silvurvinnara, hóast talvan eftir kappingina segði bronsa
Mynd: Sofus Debes Johannesen

# Spýði finaluna burtur

**Áki Andreasen var bara sjey sekund frá finaluplássinum móti lærumeistara sínum. Men tá hann valdi at fara av máttuni at spýggja, kostaði hetta sigurin**




Jákup Mørk

Tað verður nógv lagt fyri, tá Oyggjaleikir eru á skránni.

Hetta var sjónligt í judo-kappingini mánadagin, tá ein meira enn hálvsjúkur Áki Andreasen valdi at fara í holt við sínar dystir, hóast hann avgjørt ikki var so væl fyri, sum ynskiligt var.

Tvey ára miðvís venjing og møguleikin, sum júst nú var opin á Álandi vigaðu tó meira enn spýggisjúkan, og hóast viknaður, hevði Áki orku til at vinna seg í hálvfinaluna, har hann tóktist vera á sigurskós, tá bara sjey sekund vóru eftir.

Tá leyp Áki út av vøllinum at spýggja, og tað kostaði sigurin. Tað er nevnliga ikki loyvt at fara av máttuni, og so mátti Áki ásanna, at dómurin kann verða náðileysur. Og heldur enn at berjast móti Búgva Poulsen, mátti Áki fegnast saman við restini av føroyska liðnum um úrslitið, sum hóast alt gjørdist til bæði bronsu og gull.

- Ja, tað má eg so bara góðtaka, men eg rokni nú ikki við, at eg hevði klárað Búgva kortini. Hann er ótrúliga góður, og hann hevur venjari hjá mær øll árini.

Tú valdi at berjast, hóast tú vart sjúkur. Stóð nógv á?

- Eg var ikki so øgiliga illa fyri. Sjálvandi merkti eg tað, men tað var ongan tíð soleiðis, at eg umhugsaði at lata vera við at berjast. Men eg visti so ikki, at tað ikki er loyvt at fara at máttuni at spýggja. Eg ætlaði bara at fara útum, so eg fekk hatta av vegnum, áðrenn eg bardist víðari. Men tá varð eg so dømdur at tapa.

Um tú kendi reglurnar betur. Hevði tú so klára at hildið tær hasi sjey sekundini afturat?

- So hevð eg bara tikið tað innum lapellið hjá mær. Tí sjey sekund – tað er altso nóg so keðiligt.

Men tú vanst so bronsuna. Var tað eitt plástur á sárið?

- Ja, tað var tað sjálvandi. Og sjálvur kenni eg tað í øllum førum, sum havi eg vunnið silvur, staðfesti Áki Davidsen.

### FAKTA

**Einstaklingakappingar**

**÷66 kg**
Búgvi Hanusarsson Hansen tapti bronsudystin.
Sigurd Bjørn Mørkøre kom ikki víðari frá innleiðandi kappingini

**÷81 kg**
Búgvi Poulsen vann gull.
Áki Davidsen vann bronsu

**÷100 kg**
Petur Sigurð Johannesen vann bronsu.
Ragnar við Streym tapti báðar teir innleiðandi dystirnir.



Búgvi Poulsen var í serflokki besti íðkarin í sínum vektflokki
Mynd: Sofus Debes Johannesen

# Búgvi var í ser-flokki

**Føroyskt judo fekk enn eitt gull, tá Búgvi Poulsen í suverenum stíli slongdi Rhodos-búgva í gólvið**




Jákup Mørk

Samlaða heiðursmerkjasavnanin hjá judo í einstaklingakappingini kastaði tvey gull-, fýra silvur- og fýra bronsumerki av sær.

Í gjár vann Búgvi Poulsen gull, umframt at Áki Andreasen og Petur Sigurð Johannesen vunnu bronsu.

Eingin ivi er um, at tætti dystirnir vóru nógvir í tali, og at intensiteturin alla tíðina var í topp. Men við føroyskum eygum var eingin ivi um, at finaludysturin hjá Búgva Poulsen stóð sera ovarliga á listanum.

Búgvi var favorittur, og hann tóktist alla tíðina at hava tamarhald á tí, sum gekk fyri seg á gólvinum. Og vinnandi kastið gav reint ippon. Búgvi lokkaði fyrst mótstøðumanni at royna at kasta seg, men sjálvur stóð Búgvi sum kletturin. Og so var eingin góða mamma, tá Búgvi við einum armi lyfti mótstøðumannin, áðrenn hann varð langaður í gólvið.

Ippon til Búgva og gull og Ippon til Føroyar.